## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið mikudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi, sum móti kvøldi lækkar niður í sunnan og veksur upp í hvassan vind. Skýggjað og fyri tað mesta turt. Hitin millum 10 og 15 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Strúkur í vindi til hvassan vind av suðri og útsynningi, minkandi út á náttina. Skýggjað og ælaveður, seinni regn. Hitin millum 10 og 14 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi. Skýggjað og ælaveður. Hitin millum 9 og 13 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og útsynningi. Skýggjað og regn ella ælaveður. Hitin millum 10 og 15 stig.

# Indiánarabørn á framsýning

**Í Norðurlandahúsinum er í løtuni ein framsýning við málningum, ið lýsa gerandisdagin hjá meksikanskum indiánarabørnum**

LIST
*Henny Olsen*

Í Norðurlandahúsinum er ein listaframsýning latin upp. Talan er um »The Art of Indian Children«. Á framsýningini eru 17 stórir og litfagrir málningar, sum hvør í sínum lagi siga frá gerandisdegnum í Meksiko. Eisini eru klæðir, skógvar og hattar settir runt í hølunum.

Tað vóru nakrir listamenn í Meksiko, sum stúrdu fyri indiánarunum. Indiánaratalið bara minkaði. Tískil tóku teir seg saman og lótu indiánarabørnini mála teirra gerandisdag og harvið varðveita teir. Hesi børn hava ongantíð hoyrt um teldur og sjónvørp, og høvdu tí einans náttúruna at hyggja eftir. Tað sæst eisini aftur á málningunum, sum hava eitt ótal av litum.

Málningarnir eru ómetaliga stórir. Teir størstu eru upp til 12 metrar langir. Teir eru hvør sær málaðir av 25 børnum, ið eru millum 8 og 14 ára gomul.

Hesir málningar hava ferðast nógvastaðni, millum annað í USA, Japan og Týsklandi. Síðani 1999 hava teir verið í Norðurlondunum.

Framsýningin er opin hvønn dag frá kl. 10.00 til 18.00, tó sunnudagar frá kl. 14.00 til 18.00, til og við 5. oktober. Eisini er møguleiki at síggja føroysk verk frá 29. september til 5. oktober.



*Málningarnir hjá indiánarabørnunum eru sera stórir og litfagrir. Helst mugu teir upplivast*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 6 |
| Nuuk | 8 |
| Qaqortoq | 10 |
| Ammassalik | 9 |
| Saint John's | 18 |
| Halifax | 16 |
| Reykjavík | – |
| Seyðisfjørður | 13 |
| Tórshavn | 13 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 17 |
| Tromsø | 6 |
| Bergen | 14 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 13 |
| Keypmannah. | 13 |
| Helsinki | 9 |
| Moskva | 13 |
| Berlin | 17 |
| Warzawa | 17 |
| Kiev | 17 |
| Bukarest | 22 |
| Paris | 20 |
| Madrid | 25 |
| Róm | – |
| Malorca | 30 |
| Athen | 32 |
| Malta | 32 |
| Tunis | 34 |
| Beijing | 24 |
| New Dehli | 30 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 17 |
| New York | 18 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 9 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 19 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst við Eystur-Grønlandi fer eystureftir, og hevur lýggja og slavna luft við sær av útsynningi inn yvir Føroyar.



Eitt lágtrýst við Suðurgrønland fer í landnyrðing og brúgvaløg haðani fara fram við Føroyum í vikuni og hava regn og vind við sær.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 01/08 kl. 06⁰⁰– 02/09 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 12,6°
Minsti hiti máldur í sept.: ÷0,5° Mesti hiti máldur í sept.: 19,5°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 1,2 mm – mált frá 01/09 kl. 06⁰⁰–02/09 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í august: 1,2 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

31. august: Mánin næstur jørðini
3. sept.: Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2003

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 3. sep | 00.07 | 12.49 | 11.49 | — | - | 12.04 | 02.07 | 14.49 | 03.07 | 15.49 | 11.04 | 23.46 | 10.04 | 22.46 | 00.22 | 13.04 | 01.22 | 14.04 | — | 12.34 | 01.07 | 13.49 |
| 4. sep | 01.31 | 14.14 | 00.31 | 13.14 | 00.46 | 13.29 | 03.31 | 16.14 | 04.31 | 17.14 | — | 12.29 | 11.29 | — | 01.46 | 14.29 | 02.46 | 15.29 | 01.16 | 13.59 | 02.31 | 15.14 |
| 5. sep | 02.57 | 15.26 | 01.57 | 14.26 | 02.12 | 14.41 | 04.57 | 17.26 | 05.57 | 18.26 | 01.12 | 13.41 | 00.12 | 12.41 | 03.12 | 15.41 | 04.12 | 16.41 | 02.42 | 15.11 | 03.57 | 16.26 |
| 6. sep | 03.55 | 16.23 | 02.55 | 15.23 | 03.10 | 15.38 | 05.55 | 18.23 | 06.55 | 19.23 | 02.10 | 14.38 | 01.10 | 13.38 | 04.10 | 16.38 | 05.10 | 17.38 | 03.40 | 16.08 | 04.55 | 17.23 |

5 707265 100036 >